# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## CDT – loysn í eygsjón

Nýggi heilsumálaráðharrin Aksel V. Johannesen skal hava rós fyri at hava borið skjótt at í málinum um CDT sjúkuna og tiltøk í hesum sambandi. Tað kann undra, at hvørki føroyskir ella danskir myndugleikar hava reagerað fyrr, tí vit hava vitað um hesa sjúku rættiliga leingi. Men nú sær tað so loksins út til, at nakað skilagott fer at henda, og hetta eiga vit sjálvsagt at fegnast um. Aksel V. Johannesen boðaði stutt herfyri frá, at Landsstýrið hevur gjørt av, at allir føroyingar eiga at fáa tilboð um at verða kannaðir fyri arvaligu sjúkuna CTD. Ætlanin er, at øll PKU-kort hjá teimum, sum eru fødd eftir 1986 verða kannað, umframt, at fólk, sum eru í familju við CTD sjúklingar, skulu kannast beinanvegin. Øll onnur fáa tilboð um at verða kannað fyri lítið egingjald. PKU kortini eru, sum flestøll helst vita, royndir, ið verða tiknar av øllum nýfødingum í kongaríkinum, og eru tey í varðveitslu hjá danska serumstovninum í Keypmannahavn.

Heilsuhvørvið tykist at vera vælnøgt við hesa avgerð, og týski barnalæknin, Ulrike Steuerwald, sum hevur stríðst fyri, at allir føroyingar skulu vera kannaðir fyri CTD, er sera fegin um, at Landsstýrið nú ætlar at bjóða øllum at verða kannað. Hon heldur hetta vera nakað av tí besta, sum kundi henda. Tað var hon, sum upprunaliga fann sambandið millum brádligan deyða hjá føroyskum smábørnum og sjúkuna CTD.

Vit eru sostatt komin til, at politisk semja er um nøkur læknafrøðilig tiltøk og tilboð til tey, sum eru í vandabólki og annars til allar føroyingar. Nú er at bera skjótt og at koma til eina avgerð um, hvør ið skal gera hesar kanningar. Tað er, sum serfrøðingurin sigur, kanska ikki so avgerandi, hvar kanningarnar vera gjørdar, bert tær verða gjørdar og tað skjótt og væl. Her eiga fyrilit fyri teimum, sum óttast fyri at vera í vandabólki at vega tyngst. Ber tað hinvegin til heilt ella lutvíst at gera rannsóknirnar í Føroyum, so eigur hetta at verða gjørt til tess at byggja upp og at varðveita serfrøðina og førleikarnar her.

Sum vanligt í Føroyum kemur upp spurningurin, hvør ið skal gera tær kanningaar, sum møguliga skulu gerast her í landinum. Tað tykist, sum valið stendur millum Landssjúkrahúsið og Heilsufrøðiligu. Hetta valið skuldi ikki verið so trupult, tí Landssjúkrahúsið er tann stovnur, ið hevur við menniskju og teirra heilsu at gera, meðan Heilsufrøðiliga hevur ábyrgd av øðrum økjum. Tað, sum møguliga skal gerast í Føroyum, eigur tí sjálvandi at verða gjørt á Landssjúkrahúsinum. Landsstýrið ætlar eisini at gera eina klinisk-genetiska vegleiðing her í Føroyum, og eina CTD-kanningarskrivstovu. Henda kanningarstova eigur í øllum førum at verða staðsett á Landssjúkrahúsinum. Í Føroyum hava øll mál lyndi til at gerast politisk. Tað má ikki henda við hesum máli, sum nú til tykist vera komið í jaliga tilgongd. Uttan mun til hvørji atlit, ið kunnu vera, so eiga atlitini fyri tí einstaka sjúkliginum og teimum sum møguliga kunnu vera í vandabólki at telja mest. Allir føroyngar munnu vera samdir ud, at Løgtingið skjótast eigur at játta neyðturvilia peniningin.

**Sosialurin**

## Javnaðarflokkurin gongur ímóti sínum egna formanni



BJØRN KALSØ
løgtingsmaður

**Í yvirlýsing ger tingmanningin hjá Javnaðarflokkinum greitt, at hon ikki tekur undir við pensjónsreforminum hjá teirra egna formanni og fíggjarmálaráðharra, Jóannes Eidesgaard**

”Vit taka ikki undir við, at pensjónsaldurin verður hækkaður, og at motroknað verður í fólkapensjónini frá fyrst tjentu krónu afturat pensjónini”. sigur tingmanning Javnaðarflokksins í yvirlýsingini.

Hetta kann undra, tí talan er júst um broytingar, sum Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarflokksins, hevur boðað frá í Ólavsøkupakkanum, at hann ætlar at fremja.

**Pensjónsreformurin hjá Jóannesi**
Sjálvur eri eg sera kritiskur mótvegis nógvum av tí, sum ætlanin er at fremja í pensjónsreforminum hjá Jóannesi Eidesgaard, m.a. hækkaðum pensjónsaldri og mótrokning frá fyrst tjentu krónu hjá pensjonistum. Havi tó enn ikki havt møguleika at luttikið í politisku viðgerðini av sjálvum innihaldinum í pensjónsreforminum. Kemur uppskotið hinvegin til viðgerðar í Løgtinginum, soleiðis sum boðað er frá, fari eg sjálvsagt at gera mína ávirkan galdandi, fyri at fáa rættað teir skeivleikar, sum eftir mínum tykki eru í uppskotinum. Tí hetta er ikki tíðin at knokkroyta pensjonistar og aðrar veikar bólkar í samfelagnum. Tvørturímóti!!

Tað hevur undrað fleiri enn meg, at Javnaðarflokkurin kann hava tikið undir við slíkari skipan, sum formaður floksins hevur lagt upp til, bæði í løglistanum til Ólavsøkurøðu løgmans og í Ólavsøkupakkanum.

At Javnaðarflokkurin nú, tá ið almenningurin er farin at gera vart við seg leggur sjógv ímillum seg og uppskotið við at flyta ábyrgdina yvir á embætisfólk og onnur í politisku skipanini, er átaluvert og lítið álitisvekjandi.

**Fyritíðarpensjónir**
Mótrokningin frá fyrst tjentu krónu hjá fyritíðarpensjonistum verður eisini nevnd í omanfyrinevndu yvirlýsing. Tað uppskotið ber somuleiðis brá av einum yvirskipaðum politiskum leisti, sum liggur til grund fyri pensjónsreformin hjá fíggjarmálaráðharranum og harvið Javnaðarflokkinum.

Fari at mæla Rósu Samuelsen, landsstýriskvinnu frá at fylgja hesum mótrokningarleisti hjá Javnaðarflokkinum, taka uppskotið um mótrokning í fyritíðarpensjónini aftur og heldur fylgja sínum egnu ætlanum á økinum.

## Røktarheim í Klaksvík



EYÐGUNN SAMUELSEN
løgtingskvinna fyri Javnaðarflokkin

Tað var ein stórur dagur, tá ið Klaksvíkar býráð samtykti at søkja Almannaráðið um stuðul til at byggja eitt røktarheim í Klaksvík til 48 fólk. Fíggjarstøðan í Klaksvík er ikki góð, skattainntøkan er nógv minkað, og skuldin er stór, tí verður trupult hjá Klaksvíkar kommunu at útvega kommunupartin av byggiútreiðslunum. Hetta er neyvan møguligt fyrr enn í fyrsta lagi í 2012.

**Landið hækkar íløgurnar í 2010**
Í ólavsøkuuppskotinum frá landstýrinum verður skotið upp at gera eyka íløgur fyri 90 mió um árið frá 2010 til 2012 til virkisskapandi tiltøk. Peningurin skal brúkast til skipasmíð og útbyggingar innan almanna- og mentunnarøki. Mítt uppskot er tí, at Klaksvíkar kommuna fær tilsøgn um eitt lán frá landinum til at fíggja sín part av ellisheiminum, so byggingin kann byrja beinanvegin í 2010. Henda tilsøgn hevði verið við til at minkað arbeiðsloysið innan byggivinnuna í Norðoyggjum og víst, at landið setir virksemisskapandi íløgur í gongd, har arbeiðsloysið er stórt. Samstundis sum nakað verður gjørt fyri at loysa stóra tørvin á røktarheimsplássum í Norðoyggjum. Í dag standa 87 fólk á bíðilista, og akutti tørvurin er 32 røktarheimspláss.

**Týdningarmikið stig ið peikar frameftir**
At fara í gongd við at byggja eitt røktarheim nú, snýr seg um nógv meira enn tey 48 hart tiltrongdu røktarheimsplássini. Eitt nýtt røktarheim kemur at útvega kvinnum fleiri arbeiðspláss í kommununi. Hetta verða støðug arbeiðspláss, eini 70 í talið, arbeiðspláss við fastari løn hvønn mánað. Arbeiðspláss, ið vit veruliga hava fyri neyðini. Allar kanningar vísa, at um ung pør við útbúgving skulu flyta til eina kommunu, so er tað ein avgjørd fortreyt at arbeiði er til bæði kvinnu og mann. Er tað ikki so kemur familjan ikki aftur. Hjá familjum har inntøkan hjá manninum kemur frá fiskivinnuni, og tí kann vera sera óstøðug, hevur tað sera stóran týdning at ein støðug inntøka er í familjuni.

Samfelagsliga er Klaksvík í tí støðu, at vit vinnuliga mugu hava fleiri bein at standa á aftrat fiskivinnuni og í hesum høpi kann eitt røktarheim eisini verða alneyðugt. Tí peikar henda samtyktin nógv longur fram í tíðina enn vit kanska geva okkum far um.

**Hjálp til kreppurakt økir**
Sjálvt um tað var best at kommunan sjálv kláraði at fíggja tílíka útbygging, so er tað hent fyrr, at landið hevur hjálpt til. Vágs kommuna hevur fingið játtað rentu- og avdráttarfrítt lán til røktarheim og nú ferð landið at byggja ítrottarhøll í Sandoy. Tí er tað rætt um landið hjálpti Klaksvíkini við einum láninum so vit kunnu koma í gongd við at byggja røktarheimið sum skjótast.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13:30

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.